# *Heilsuhjálparafelag Føroya*

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn 14.11.2019

**Hoyringssvar viðvíkjandi:**
***1)****Uppskot til broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. ( lækking av mótrokning.*
***2)****Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum*
*( Hækking av grundupphædd og lækking av frádráttarfríari inntøkuupphædd)*
***3)****Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti ( Ásetingarlógin)*
*(Skattafrádráttur á kr. 6.000 um árið til fólkapensjónistar)*

**Heilsuhjálparafelag Føroya vil við hesum gera viðmerkingar til lógaruppskotini undir einum.**

Heilsuhjálparafelag Føroya metir, at lógaruppskotini leggja upp til fleiri batar, tó kunnu vit ikki taka undir við, at lagt verður upp til at mótrokna í grundupphæddini í fólkapensjónini fyrst, fyri komandi pensjónistar við høgum inntøkum. Grundupphæddin er skattafrí, og er hon ein góður stuðul hjá fólki, tá tey náða pensjónsaldur, og tí eigur grundupphæddin ikki at lækka ella blíva burtur.

Fólkapensjónistar, ið ikki ynskja grundupphæddina, kunnu siga hana frá sær.

Vit hava ikki fleiri viðmerkingar til uppskotini.

Vinarliga

v/Heilsuhjálparafelag Føroya

Mary Antonsdóttir, forkvinna

Ása Olsen, fyrisitingarleiðari

***Fr. Petersensgøta 7 · FO-100 Tórshavn***
***Telefon 317725 · Fax 319117 · email: hhff@hhff.fo · heimasíða.: www.hhff.fo***